## Vígdis í Smiðjuni

20.-22. desember verður framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við keramikk hjá Vígdis Petersen. Framsýningin er sprottin úr einum Artist-in-Residence uppihaldi í Japan 2006, sum er eitt stað, har keramikara úr øllum heiminum koma. Í Japan er keramikk sera høgt í metum, í mun til aðrastaðni í heiminum. Framsýningin er opin allar tríggjar dagarnar millum kl. 14 og 20.




## Livandi prát og nógvur livandi tónleikur

Kristian Blak og Hanus G. Johansen verða gestir í útvarpssendingini Pink á Rás 2 í kvøld kl. 19.00-21.00. Í sendinini verður prátað við teir báðar tónleikararnar um lívið, tónleikin og jólini. Eisini verður annað jóla-prát sent beinleiðis frá miðstaðarøkinum. Ungdómssendingin PINK verður lagt til rættis av Heiðu Nolsøe og Sóley Danielsen.

# Í ringasta føri tvær milliardir

**Sambært Jóannesi Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, verður í ringasta føri talan um tvær milliardir, ið landið kemur at hava í halli næstu fýra árini. – Vit hava 1,8 milliard krónur í landsbankanum, sum vit kunnu nýta um tað verður neyðugt, sigur landsstýrismaðurin**

KREPPA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, heldur tað vera óheppið, at føroysku pensjónirnar verða nýttar at fíggja húsalán í Danmark. Tí vil hann gera eitt føroyskan realkredittfelag*

Í gjár skrivaði Sosialurin, at landsbankastjórin metir, at Føroyar kunnu fáa ein tørv á at lána einar tíggju milliardir komandi fimm árini. Tó er tað so, at landið bert kann verða noytt at finna tvær milliardir, tí bankarnir skulu skaffa sær umleið sjey milliardir til endurfígging. Nakað, ið er trupult, um búskapurin í Føroyum ikki er sterkur, og hetta kann eisini hava óhepnar avleiðingar.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, metir tó, at hendan kreppan ikki verður so djúp.

- Eg trúgvi, at vit kunnu ríða hendan stormin av okkum. Tað er rætt, at landskassin er kroystur í núverandi støðu, men tað kann broytast so skjótt. Kemur fiskurin aftur, so fara fólk aftur at tora betur, so fyritreytirnar kunnu broytast frá degi til dags. Vit hava eisini 1,8 milliard krónur í landsbankanum, sum vit kunnu nýta um neyðugt, metir Jóannes Eidesgaard.

Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, tekur undir við, at peningurin er har fyri at vera nýttur, men hann metir eisini, at mann hevur trupulleika, um støðan er verri seinni.

- Mann skal syrgja fyri at hava gott gjaldføri, og tí skal tað fyllast í aftur beinanvegin peningur er nýttur av hasari kontoni, greiðir landsbankastjórin frá. Hann leggur afturat, at mann helst ikki sleppur undan at læna pening komandi árini.

### Hava sæð verri

Jóannes Eidesgaard metir eisini, at vit hava verið í eini verri støðu í 1994, og tá gekk tað væl at koma fyri seg aftur.

- Mann sær ongi tekin um, at vit ikki skulu megna at loysa henda trupulleika, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann metir eisini, at árið í ár er serligt ár, tí hallið verður 500 milliónir krónur, og hann er eisini sannførdur um, at tað ikki er nú, at mann skal skera niður á null, tí tíðin er ikki til tað

### Stýrt ov illa

Í blaðnum í gjár greiddi Sigurð Poulsen frá, at vit hava eitt strukturelt hall, og at vit hava stýrt ov illa. Hesum tekur Jóannes Eidesgaard undir við.

- Tú kanst siga, at vit ikki hava stýrt nóg væl seinastu tíðina, tá tað kemur til hetta, men tað var rætt at gera skattalættar í 2004 og 2005, men tað er ivasamt, um vit gjørdu rætt í 2007 og 2008, greiðir fyrrverandi løgmaður og núverandi fíggjarmálaráðharrin frá.

Sambært Jóannesi Eidesgaard, er tað ein gamal trupulleiki, at Føroyar hava eitt strukurelt hall, men at hetta er nakað mann skal arbeiða við.

- Tað vísir seg, at onki hendur í góðum tíðum. Tá vísir seg, at mann aldrin ger neyðugar broytingar í góðum tíðum, men tá tíðirnar eru ringar vísir tað seg, at politikarar eru meira fúsir at gera tað sum krevst, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann leggur afturat, at kommunalreformurin, pensjónsreformurin og ein nýggj skipan við fiskivinnuni skulu gerast. Hetta er tað sama sum Sigurð Poulsen nevndi sum størstu trupulleikarnar hjá føroyska samfelagnum.

### Bankarnir

At bankarnir í komandi tíðum skulu endurfíggja nógv lán hjá sær kann, sambært Sigurði Poulsen, gerast ein trupulleiki, tí um búskapurin ikki er nóg sterkur, verður torførari. Eitt náttúrligt úrslit av hesum, er, at tað rakar tey, ið hava nakað við bankan at gera.

Fíggjarmálaráðharrin greiðir frá, at hann er bangin fyri, at bankarnir ikki kunnu veita lán og fígging til virksemi í landinum.

- Tað, sum er vandamikið, er, at summir bankar ikki hava gjaldføri, og teir, sum hava, eru bangnir fyri at koyra tað út í samfelagið, tí teir fáa so trupult við at finna endurfígging, greiðir Jóannes Eidesgaard frá. Hann metir eisini at næsti bankapakkin fer at loysa upp fyri peningarenslinum, og hann ivast ikki, at føroysku bankarnir verða ein partur av hesum.

# Vit skulu hava pensjónirnar heim

**Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, hevur eitt hugskot um, at eitt føroyskt realkredittfelag verður gjørt. – Í løtuni verða føroysku pensjónsirnar nýttar at fíggja húsalán í Danmark. Tað skuldi verið gjørligt at gera eitt føroyskt realkredittfelag, soleiðis, at mann á tann hátt fær skapt betri fyritreytir fyri bankarnar her, sigur Jóannes Eidesgaard**

PENGAR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard metir tað vera óheppið, at føroyskar pensjónir í løtuni verða nýttar til at fíggja donsk húsalán. Hann hevur eitt hugskot um, at eitt føroyskt realkredittfelag skal setast á stovn, soleiðis, at bankarnir í framtíðini kunnu nýta sína orku til at fíggja vinnulívið.

- Í løtuni er tørført hjá bankunum, at veita fígging. Tí haldi eg tað vera óheppið, at okkara pensjónir í løtuni eru í realkredittfeløgum í Danmark, men sum er, sær tað út til, at tað er mest attraktivt at hava peningin uttanlands, tí har er hann tryggur og gevur rímiligt avkast, metir fíggjarmálaráðharrin.

### Meira til vinnuna

Fyri at halda samfelagnum gangandi er tørvur á kapitali til vinnuna.

- Við hesum realkredittfelagið skuldi tað verið gjørligt, at nýta hendan pening til húsalán, soleiðis at bankarnir kunnu vera avlastaðir eitt sindur har. Á tann hátt er gjørligt hjá bankunum at nýta meira orku upp á vinnuna, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.

Hetta er tó ikki nakað, ið skal gerast í óðum verkum, metir Jóannes Eidesgaard. Hann leggur afturat, at mann ikki kann tvinga pening nakran veg, men við hesum realkredittfelagið, skuldi verið gjørligt at skapt rammur, ið kundu viðført at meiri peningur kundi nýtast her.

## Sjey milliardir til bankar

**Í gjár skrivaði Sosialurin, at sambært Sigurði Poulsen, landsbankastjóra, mugu Føroyar læna tíggju milliardir næstu fimm árini. Tað eru tó bankarnir, ið eiga bróðurpartin av hesum tørvi**

KREPPA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Ein misskiljing hendi í gjár, ið hevði við sær, at bankarnir ikki vóru nevndir, hóast teir eiga bróðurpartin av lánunum, ið skulu takast. Teir skulu nevniliga nýta tær til endurfígging, sambært Sigurði Poulsen.

Hetta vil siga tað sama sum, at landið verður noytt at læna eina tvær milliardir krónur og kommunurnar umleið eina milliard krónur, um verandi gongd heldur fram.

Í gjár segði Sigurð Poulsen eisini millum annað, at vit fyri at kunna fáa hesa fígging á umleið tíggju milliardir krónur, mugu føroyingar megna at fáa stýr á egnan búskap, tí tað er ein fyritreyt, at útlendskir fíggingarstovnar hava álit á okkum, um vit skulu fáa hesi lán. - Fyrst mugu vit fáa stýr á fiskivinnuna, soleiðis, at vit fáa eina javnari veiðu. Ein nýskipan av pensjónini krevst eisini, tí tey eldru gerast alsamt fleiri. Land og kommunur mugu veraundirløgdlógum, soleiðis, at peningurin verður nýttur á bestan hátt og samstarvið gerst betur, umframt, at húsarhaldini mugu fáa álit á føroyska búskapinum, segði Sigurð Poulsen.

Hóast hesi lán á tíggju milliardir helst skulu gerast fyri at halda samfelagnum í gongd, sambært landsbankastjóranum, so verður skuldin hjá landinum ikki størri enn tríggjar milliardir, tí sjey av milliardunum skulu nýtast til endurfígging hjá bankunum. Sostatt verður skuldin, ið verður lagd afturat einar tríggjar milliardir. Men búskapurin má eisini vera sterkur, fyri at bankarnir skulu fáa endurfígging.